**Umdømisfundur í Keflavík 17. mars 2012**

Fari fyrst at umbera fyri at ikki bar til at verða til umdømisfundin í november, orsaka av orkan í Føroyum. Tíbetur gekk betur hesa fer.

Eg fari at hava mína frágreiðing á føroyskum, vónandi skilja tit hvat eg sigi.

**Skýrslur:**
Allir klubbar hava sent sínar skýrslur fyri tíðaskeiði november – januar. Rósan hevur eisini sent skýrslu fyri februar. Skýrslurnar vísa at allir klubbar hava regluligar fundir og arbeiða miðvíst við sínum málum.

**Arbeiðir:**
Síðani seinasta fund hava klubbarnir Kiwanis Tórshavn og Kiwanis Eysturoy havt jólatræsølu og gekk sølan hjá teimum væl. Kiwanis Rósan hevur havt bingo og fyri jól høvdu tær eitt stórt bingo, har allur peningurin fór til "Í menniskjum góður tokki"
Kiwanis Rósan arbeiðir í løtuni við at fara undir lutaseðlasølu. Kiwanis Tórshavn fer eisini skjótt undir teirra árligu lutaseðlasølu, meðan Eysturoy heldur áfram við søluni av Kiwanislyklinum.

**Onnur tiltøk :**
Kiwanis Rósan hevði sítt afturvendandi tiltak, har skipa var fyri adventsdegi fyri gomlum borgarum í kommununi. Hetta tiltak eyðnaðist eisini sera væl.

**Gávur:**
Síðani seinasta fund eru hesar gávur givnar:

Kiwanis Tórshavn : 4000,00 dkr.. (ca. 88.000,00 íslkr.) Jólaaftan í KFUK fyri einsamøllum fólkum.
Kiwanis Rósan......: 3000,00 dkr.. ( ca. 66.000,00 íslkr.)Jólaaftan í KFUK fyri einsamøllum fólkum
30.000,00 dkr. ( ca. 660,000,00 íslkr.) "Í menniskjum góður tokki"
Kiwanis Eysturoy.: 5.000,00 dkr. (ca. 110.000,00 íslkr.) Kappróður fyri ungdóm í Eysturoy
10.000,00 dkr. (ca. 22.000,00 íslkr.) Skótar í Eysturoy

**Limatiltøk:**
Allir klubbar skipaðu hvør sær fyri jólaborðhald fyri felagaðum sínum. Tann 25. februar var skipa fyri einum felagskvøldið fyri allar klubbarnar, við tunnuslàttri og mati,og var hetta kvøldið sera hugnaligt og skemtuligt.
Kiwanis Tórshavn og Rósan hava annað hvørt mikukvøld hugnakvøld í Kiwanishúsinum. Av tí at vegurin úr Eysturoy er ov langur, hava tey ikki verði við enn. Hetta er bert eitt hugnakvøld við prátið, kaffi og køkum. Sera vælumtókt av teimum í møta.

**Vitja klubbar:**
Tann 29. februar var eg og vitjaði Kiwanis Tórshavn á teirra limafundi. Fundurin var avbera góður og gav mær ein varhuga av at klubburin koyrir væl við einum positivum anda.
01.mars var eg somuleiðis á vitjan hjá Kiwanis Eysturoy. Ein sera góður og positivur fundur. Á fundinum blivu tvær gávur handaðar.
Mín fatan er, at báðir klubbar eru góðir vælskipaðir klubbar.

**Økisfundur:**
Tann 25. februar høvdu vit økisfund í Kiwanishúsinum. Eg hevði avgjørt at leggja stórsta dentin á verkætlanina "smábarnastívkrampi" og gjørdi tiskil eina frágreiðing við tilfari um tiltaki og aftaná sóu vit filmin um tað sama. Aftaná filmin heitti eg á klubbarnar, um at taka eina skjóta avgerð, um luttøku í verkætlanini.
Tað gleðir meg stórliga, at allir klubbar hava tikið undir at verða við í hesum tiltaki.

Á økisfundinum legði eg somuleiðis framm eitt uppskot um at luttaka á Europatinginum. Orsaka av at tingið verður í Bergen og at beinleiðis flúgving millum Føroyar og Bergen byrjar 03. juni, so haldi eg at hetta kann verða ein møguleiki og ein spennandi og upplærandi túrur. Sjálvandi ikki minst, tá hugsa verður um at 9 atkvøður til okkara fyrrverandi umdømisstjóra Oscar, liggja í Føroyum, Tí havi eg lagt uppskot framm, at allir klubbar velja eitt umboð í ein bólk, ið fyrireikar túrin.Tað sýnist sum stórur áhugi er at gera hendan túrin.

Eitt annað mál, ið liggur mær nær at hjarta er felagatalið. À einum hvørjum høvi mær býðst, leggi eg dent á at økja um felagatali. Soleiðis var eisini gjørt á hesum fundi, har eg heitti á felagarnar um at koma við uppskotum um hvussu vit gera.
Kiwanis Tórshavn hevur fingið ein nýggjan felaga og Kiwanis Rósan hevur havt 2 gestir á fundi.
Eg heitti á forsetarnar um at taka støðu til, um vit skulu skipa fyri einum felags hugna-kunningarkvøldið um Kiwanis, har hvør limur bjóðar einum gesti við, tað verði seg vini,arbeiðsfelaga ella familjufelaga. Eisini her heitti eg á forsetarnar at velja eitt umboð i bólk, at fyrireika eitt kunningarkvøld.

Somuleiðis vóru forsetanir bidnir um at taka eina støðu um okkara heimasíðu, soleiðis at vit fáa eina felags aktiva heimasíðu. Vit hava fingið eitt tilboð um uppsetan av hesari, so vónandi gongur ikki ov long tíð, fyrrenn hetta mál er rokkið.

**Sociala:**
Eitt uppskot frá Sámali Bláhamar úr Tórshavn er at allir klubbarnir, fara ein túr til Vestmanna at vitja ein sera aktivan ungdómsklubba ið er har. Hesin ungdómsklubbi arbeiðir við nógvum spennandi tiltøkum og avgjørt er at vit allir klubbar fara á vitjan.
Sjálv legði eg uppskot um at fara til ein sera vælumtóktan sjónleik ið verður spældur í Eysturoy. Ætlanin er at vit fáa ein góðan bita, áðrenn vit fara til sjónleik. Tíverri er leikurin so vælumtóktur at vit bert kunnu fáa atgongumerkir til í kvøld....so sjálv sleppi eg ikki við..men vónandi fáa tey ið fara, eitt sera hugnaligt kvøld saman.

**Vitjan av umdømisstjóra:**
Næsti økisfundur okkara skuldi verða 29. apríl, men hesin verður broyttur, orsaka av at vit hava hoyrt at vit fáa vitjan av umdømisstjóranum og gleða vit okkum til tað.

Fari at enda her, men fari fyrst at nyta høvi at takka Dóru so hjartaliga fyri hennara hjálpsemi, tá brúk hevur verði fyri hesum.

Við Kiwanis kvøðu

Elin Joensen
Økisstjóri Føroyaøki.